# Ætlar Tórshavnar Býráð at Kollafjørður skal avtoftast?

Eitt tað besta mátið fyri, um ein bygd hevur framtíðar livilíkindi, er barnatalið í bygdini. Nú børnini byrja skúlan, kemur hettar til sjóndar við at kanna, hvussu nógv børn fara í fyrsta klassa.

Her hjá okkum eru tølini mest at kalla ræðandi. 14 fóru í fyrsta klassa nú ímóti 22 í 2000. Hyggja vit eftir samlaða barnatalinum í skúlanum nú, so eru 140 í 9 klassum ímóti 136 í 7 klassum í 2000.

Fólkavøksturin síðan 2000 er 76 fólk ella 10 – 12 um árið.

Ræðandi tøl, ið vísa beint ímóti avtofting av einari bygd mitt í landinum og við øllum náttúrligum menningarmøguleikum.

**Orsøkir**
Tíðarskeiðið, vit her tosa um, er tað sama sum tíðin vit hava verið partur av Tórshavnar Kommunu, so nærliggjandi er at hugsa, at tað er her orsøkin er at finna.

Makaleys stýringsmisrøkt, sum her er ikki sædd her á landi áður. Rætt skal vera rætt, at her er bygdur nýggjur skúli, heilsumiðstøð og ítróttarhøll. Alt góð og neyðug ting. Føroya longsta kajsíða er eisini komin á Langasandi.

Sæð í baksýni, so er hettar helst gjørt fyri at kyrra fólki úti í bygdini, so tey ikki varnast tær tápuligu ætlanir, ið eru fyri fjørðin sum heild. Del og hersk siga danir.

Grundleggjandi orsøkin fyri tí negativu gongd, sum vit vísa á hvat fólkavøkstri viðvíkir, er fyrst og fremst, at her verður einki útstykkjað. Ungdómurin, ið ikki vil flyta til Havnar, flytir til grannabygdirnar at búseta seg. Samstundis er býráðið í fer við at spreingja røkur inn í Kirkjubøreyn, so fólk kunnu búgva á hillum meðan stórt og gott byggilendi er her runt allan fjørðin hjá okkum.

**Etiska støði í viðferini av kollfirðingum**
Sum embætisfólk hjá tí almenna, tað verið seg land ella kommunu, so skal ein arbeiða eftir lógum og reglum, ið eru galdandi. Haraftur at so skal embætisverkið altíð hava trygd og trivna hjá borgaranum í huga, tí tað er borgarin, ið skal tænast – hann er arbeiðsgevarin.

Vit og skil má altíð nýtast, sjálvt um eingin reglugerð er tøk um hettar ella hattar málið.

Stóra projektið at gera bingjuhavn inni á botni í Kollafirði, ið leiðslan fyri Tórshavnar Havn er byrjað uppá, brýtur við øll hesi princippir.

Fyri tað fyrsta, so er tað ørskapur at leggja slíkt virksemi mitt inn í eitt bústaðarøki. Fyri tað næsta so hevur leiðslan størri ætlanir enn tað teir eru í fer við nú, sum teir ikki vilja kunna borgarin um. Teir bíða helst bara eftir einum nýggjum býráði sum kann geva grønt ljós.

Harafturat so hevur leiðslan roynt at funnið øll møgulig undantøk fyri krøvum, ið áttu at verið rímulig fyri trygd og trivna hjá borgarunum. Soleiðis er eingin árins- og umhvørviskanning gjørd. Etiska støðið og virðingin fyri borgarnum runt Kollafjørð verður kanska best lýst við hendingini nú um dagarnar, tá ið russiski trolarin fór á flesjarnar. Báturin kom av Kollafirði, og nú vísir tað seg, at hann hevði onga ábyrgdartrygging! Eitt makaleyst forsømilsi av Tórshavnar Havn at lata skip koma inn ímillum hús uttan slíka trygging. Havnarmyndugleikin hevur allan myndugleika innan fyri havnamerkini og kann tí seta øll neyðug krøv um trygd til skip í koma inn. Um vit og skil hevði verið nýtt, so hevði millum annað landskassin spart einar 10 til 15 milliónir.

Aftan á at leiðslan fyri Tórshavnar Havn hevur skaffað okkum luftdálking, ljóðdálking og ikki syrgir fyri at skip, ið koma á fjørðin eru ábyrgdartryggjaði, so halda vit, at Tórshavnar Býráð eigur at finna nýggja havnarleiðslu, ið tekur eitt rímuligt atlit til trygd og trivna hjá borgarunum.

**Næsta katastrofustað Kollafjørður?**
At skip fara á land er ikki nakað nýtt, tað kemur at henda av og til. Trengri umstøður, ið skipini hava, størri er møguleikin. Inni á botni í Kollafirði er so trongt og veðurhart, at tað er bara ein tíðarspurningur, nær hesi stóru skipini, ið ætlandi skulu nýta hesa nýggju havn, bera við land. Gera tey tað, so fara tey á hol, tí hettar eru skip, ið viga túsundtals tons. Hendur hettar, so er katastrofa runt allan fjørðin.

Bygdin okkara ábyrgd – verið við at bjarga henni!

Vit halda at trivnaður, búseting, umhvørvisvernd og livilíkindir annars runt fjørðin hava verið fyri óvanligari stórari misrøkt, síðan vit blivu partur av Tórshavnar Kommunu.

Skulu kollfirðingar steðga ørvitisviðferðini, ið vit fáa frá Tórshavnar Býráð, so eiga øll at koma við í felagið hjá okkum, tí størri felagið er størri er ávirkanin.

**Høgni Johansen, formaður**

**Ingun Helmsdal, næstformaður**

**Vegna Bygdabjarging**

# Val og valskeið

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



**Føroyska stýrisskipanin sigur, at eitt løgtingsvalskeið er fýra ár. Tað vil siga, at løgtingsval skal vera í seinasta lagi fýra ára dagin aftaná, at seinasta val hevur verið. Í verandi støðu skal sostatt val vera í seinasta lagi hin 19. januar 2008. Tríggjar orsøkir kunnu vera til at løgtingsval skal vera:**

**1.** Fýra ára skeiðið er runnið
**2.** Ein meiriluti í tinginum samtykkir, at val skal útskrivast
**3.** Løgmaður tekur avgerð um at útskriva val.

Hendan føroyska skipanin líkist skipanum í teim flestu londunum vit samanlíkna okkum við. Men okkurt landið hevur aðra skipan. Í Noregi ber ikki til at hava stórtingsval í ótíð. Har skal tingið sita alt valskeiðið, sum er fýra ár. Tí hava norðmenn val fjórða hvørt ár í september mánað. Í Noregi er tó fleiri ferðir hent, at stjórnarskifti hevur verið í sama valskeiði.

Um norska skipanin ella skipanin í hinum londunum er betur kann tjakast um, men í øllum førum virka skipanirnar í hinum norðurlondum, burtursæð frá Noregi, rættiliga væl. Við hvørt situr tingið alt, ella nøkulunda alt, valskeiðið, og við hvørt verður val útskrivað, um okkurt serligt tekur seg upp. Men tað er sjáldan, at stjórnarleiðarnir misbrúka rættin til at útskriva val.

Eitt annað, sum eisini kann hava týdning, er nær á árinum best er at hava val. Í eitt langt tíðarskeið frá 1946 til 1990 hava vit í Føroyum havt løgtingsval í november. Á mangan hátt hevur hetta hóskað væl, serliga tí tá hava fólk flest verið heima. Við møguleikanum fyri brævatkvøðu hevur hetta kanska ikki so stóran týdning longur, men tá hugsað verður um landsstýrisskipan og endaligu samtykt av fíggjarlógini er hetta í seinra lagi á árinum. Í 1994 var valið í juli, og tað riggaði kanska heldur ikki so ógvuliga væl, løgtingssetan byrjar á ólavsøku, og tá skuldi gjarna eitt arbeiðsført landsstýri verið. Í 1998 og 2002 vóru valini 30. apríl. Hetta var kanska ikki ringasta tíðin. Tá var tíð at skipa seg áðrenn ólavssøku, og heystið og veturin kundi brúkast til dygt lóggávuarbeiði. Av ymiskum orsøkum varð val útskrivað aftur 19. januar 2004. Hetta er ikki serliga heppin tíð at halda væl. Í 2004 kom valið heldur knappliga, og fíggjarlógin var fingin frá hondini.

Men tá nú val skal vera aftur í seinasta lagi hendan dato í 2008 fer valstríðið fram nú í vetur, og er veruliga longu byrjað. Hetta ørkymlar samarbeiðið í landsstýrinum og í samgonguni, og gongur ikki minst útyvir eina komandi fíggjarlóg við tilhoyrandi undirliggjandi ætlanum, sum til dømis íløguætlanir og møguligum lógararbeiði.

Í sambandi við tann turbulens, sum hevur verið seinastu tíðina í verandi samgongu hava tingmenn ført fram, at seriøst arbeiði ikki verður gjørt hesa tíðina til valið. Fíggjarlógin, sum skal samtykkjast áðrenn 1. januar verður meira at kalla ein provisorisk ætlan, sum aftur kemur at hava við sær nógvar eykafíggjarlógir í 2008. Órógvin, sum er komin í tingarbeiðið, serliga innan samgonguna, kemur serliga av tveimum viðurskiftum. Fyrst er tað uppskotið hjá tingformanninum, sum ógjøgnumarbeitt kemur í seinastu løtu og skal umskipa alla valskipanina. Slíkt kann ikki annað enn provokera stóran part av tingmanningini og skapa ruðuleika í arbeiði annars. Uppskot um nýggja valskipan eigur at koma tíðliga í einum valskeiði og fáa gjølliga viðgerð.

Eitt annað, sum hevur órógvað og fyri ein part skapt øsing, eru útmeldingarnar frá nýggja fíggjarmálaráharranum. Tað at nógv ferð er á búskapinum vita øll, men at minka um ferðina ella køla av, má gerast við varsemi. Tað er í øllum førum betur at hava trupulleikan við góðari gongd og vøkstur í búskapinum enn tí øvugta við einum niðursjóaðum búskapi. Ein nýggjur maður eigur ikki at koma og gera um seg við at mæla til at bróta politiskar avtalur, sum gjørdar eru frammanundan. Í øllum førum eiga slík tilmæli at koma stillisliga og á røttum staði, tað vil siga á landsstýrisfundi. Sandoyartunnillin hevur so nógv onnur aspektir enn bert ávirkanina frá sjálvari íløguni. Landafrøðiliga og samfelagsliga røkkur hann nógv longur. Og so tað ólukku uppskotið um at avtaka skattafrádráttin fyri sjómenn og ógilda samtyktu skattalækkingarnar. Hetta vil bert minka um møguleikarnar fyri meiri arbeiðsmegi, so tað ger størri skaða enn gagn í núverandi støðu, har tað mest tiltrongda er at fáa fleiri fólk á arbeiðsmarknaðin.

Ein løgin útmelding kom eisini frá fíggjarmálaráðharranum, og tað var, at búskapurin veit ikki av, at tað er valár. Tað er nakað tvætl. Búskapurin hevur onga tilvitan. Harafturímóti er búskapurin alla tíðina undir ávirkan frá øllum maktum rundan um hann, bæði innlendis og útlendis. Og tær politisku náttúrumaktirnar, sum millum annað vísa seg í einum valstríði hava so avgjørt ávirkan. Bæði stríðið hjá Laksafoss at steðga Sandoyartunnlinum og stríðið hjá Lognberg og øðrum at fáa arbeiðið í gongd ávirka búskapin. Tá ið ein fer í eitt starv, sum frammanundan er avmarkað av politiskum avtalum, sum ein beinanvegin gerst partur av, eigur ein at hava politiska tilvitan og provokera so lítið sum møguligt. Tí áðurnevndu politisku náttúrukreftirnar vísa seg rættiliga skjótt. Eg ivist ikki í, at Magni Laksafoss er bæði dugnaligur og væl útbúgvin búskaparfrøðingur, men "et er et søkort at forstå, et andet skib at føre".

Eitt annað, sum bæði ávirkar politiska veðurlagið og eisini búskapargongdina, er klandrið, sum kemur at halda fram frá nú av og versna fram móti valinum í januar. Sum onkur núverandi samgongumaður hevur sagt, so kann hetta oyðileggja møguleikarnar fyri, at júst hendan samgongan kann halda fram. Um tað er gott ella ringt skal eg lata vera ósagt, men eingin orsøk er væl til at virka fyri tí. Besta loysnin fyri allar partar, ikki minst fyri løgmann sum samgonguleiðara, er tí at útskriva val sum skjótast.

Tey stórmál, sum eru eftir at loysa, vera best loyst aftan á eitt val, heldur enn at vera skundað ígjøgnum í ráðaloysi beint undan einum vali. Ein onnur orsøk til at val eigur at verða útskrivað nú er, at nú er møguleiki fyri at fáa eina betur valtermin. Sum eg nevndi at byrja við, er januar mánaði ikki nakar góður mánaður at hava val. Betur er tí at koma aftur til skipanina við at hava val um heystið. November mánaður hevur verið brúkiligur, men oktober er helst upp aftur betur. Tá er tíð at fáa landsstýri skipað (ella halda fram), og so fáa rímuliga góðar umstøður at fáa eina væl gjøgnumarbeidda og skilagóða fíggjarlóg frá hondini.

Løgmaður ger tí rættast í at útskriva val, sum so kann vera um leið miðan oktober. Eitt val miðskeiðis í oktober er ikki val í ótíð, tá eru kortini bert tveir mánaðir eftir av valskeiðinum.